# Eg eri líka súrur til ar

**– Eg kann vera akkurát líka súrur og strævin til arbeiðis, sum eg eri í Talent. Eg haldi faktiskt, at eg eri fittari í Talent, enn eg eri til arbeiðis, men í grundini eri eg bara, sum eg eri – eisini í Talent, sigur Peter Aalbæk Jensen, dómari. Hvønn fríggjadag styrkir hann seg við morgunsangi á arbeiðsplássinum hjá sær**



*- Í mínari bransju mást tú við hvørt taka skjótar avgerðir, men so mást tú eisini kunna viðurkenna, at tú tekur onkrar skeivar avgerðir. Og tað havi eg eisini gjørt í Talent, sigur Peter Aalbæk Jensen, dómari.*
*Mynd: DR*

TALENTKAPPING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

– Vit syngja kristnar morgunsangir hvønn fríggjamorgun á Zentropa, so kanska haldi eg, at eg havi fingið syndafyrigeving og kann verða ordiliga óndur í Talent fríggjakvøld.

Dómarin Peter Aalbæk Jensen er altíð til reiðar við eini øðrvísi viðmerking – ikki minst tá túsundtalsfólk í Danmark og Føroyum hyggja eftir honum í sjónvarpi. Hann er kendur fyri at hava høga sigarføring, kann vera provokerandi og harður, tá hann sigur sína hugsan í Talent, men onkrastaðni fjalir seg ofta eitt skeivt smíl – og kanska er hann eitt vet øðrvísi, enn fólk uppliva hann á skíggjanum.

- Eg haldi, at tað er ein góður vani at syngja kristnar morgunsangir, og einaferð um vikuna savnast øll í Zentropa fyri at syngja morgunsang. Tað gevur gott samanhald og er ein góð byrjan á dagin, sigur Peter Aalbæk.

## Almennur persónur

52 ára gamli Peter Aalbæk Jensen er filmsframleiðari. Hann stovnaði í 1992 filmsfelagið Zentropa saman við leikstjóranum Lars Von Trier, og síðani hevur Zentropa framleitt eina rúgvu av vælumtókum donskum spælifilmum. Aalen hevur í nógv ár verið ein almenur persónur í Danmark, og hann hevur eisini fingið serliga Bodil-virðisløn fyri sítt stóra arbeiði til frama fyri donskum filmi.

Seinastu tíðina er hann vorðin kendur sum tann harði dómarin í sendirøðini Talent, sum sjónvarpsstøðin DR1 sendir í bestu senditíð fríggjakvøld.

Millum tey mongu, sum hava fingið hørð orð við á vegnum frá Peter Aalbæk, er 12 ára gamli føroyski tónleikarin Ragnar Finsson, sum tó hevur yvirlivað fleiri umfør í hørðu kappingini og verður við í finaluni í Talent, sum verður send fríggjakvøldið.

## Øll skulu hava ein kjans

Peter Aalbæk var rættiliga ivasamur, tá hann fyrr í ár varð spurdur, um hann vildi vera dómari í Talent-kappingini hjá Danmarks Radio.

- Eg ivaðist í, um eg var tann rætti at meta um fólk, sum skuldu royna seg við dansi, sangi, akrobatikki og gandakynstur. Eg lat megtó lokka til at gera eina roynd-arupptøku, og aftan á hana var eg ikki í iva meira.

- Eg helt, tað verða ótrúliga stuttligt at sita har og verða konfronteraður við alt tað, sum fólk royna at venja og blíva betur til. So tað endaði við at blíva eitt nýtt kærleiksforhold hjá mær, sigur Peter Aalbæk.

Hvat hevur verið tað besta við at vera dómari í Talent?

- Tað hevur verið at sæð stóra fjølbroytni í kreativitetinum. Fólk hava dansað



*Myndir: DR*

*– Vit syngja kristnar morgunsangir hvønn fríggjamorgun á Zentropa, so kanska haldi eg, at eg havi fingið syndafyrigeving og kann verða ordiliga óndur í Talent fríggjakvøld.*
*Peter Aalbæk*

